# 70 ára gamal skúli heldur opið hús

**Leygardagin 1. september eru 70 ár síðani, at Føroya Studentaskúli og HF-skeið - landsins største og elsti miðnámsskúli- varð settur á stovn**

**HÁTÍÐARHALD**
*Tíðindaskriv*

Hetta fer skúlin at halda við at bjóða almenninginum til opið hús komandi leygardag, 1. september, kl. 13-16. Ymsu lærugreinirnar fara at hava framsýningar, framførslur og kafétiltøk. Millum tiltøkini eru kaféir við mati frá mentanum, sum málfak skúlans eru knýtt at, ymiskar spurningaroyndir, har vitjandi kunnu royna sína almennu vitan innan søgu, mentan og náttúrvísind, ymiskur upplestur og tónleikur. Listaframsýning verður við verkum hjá fyrrverandi næmingum. Og eisini verður ein framsýning av teimum lærubókum, sum lærarar skúlans hava greitt úr hondum upp gjøgnum árini.

Kl. 14 verður eitt tiltak í samkomuhøll skúlans, har Mikkjal Helmsdal, rektari, og Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í skúlamálum, flyta fram røður og blandað kór við næmingum og lærarum syngur.

Sunnudagin 2. september kl. 16 er almenn kvøldseta, har framførdir verða sangir úr teimum sangleikunum, sum næmingar skúlans hava framført seinastu 10 árini, filmsbrot verða víst og hugleiðingar um skúlan og søgu hansara bornar fram.

Føroya Studentaskúli og HF-skeið hevur hesi 70 árini, ið hann hevur verið til, klakt umleið 4300 studentar og knappliga 1000 HF-pisur. Hann hevur tí havt ein avgerandi leiklut í teirri menningini av útbúgvingarstignum hjá føroyingum hesa knøppu ¾ øld, ið hann hevur virkað. Seinastu árini hevur skapandi virksemið verið ein týðandi partur av ímynd skúlans, og mong ung og lovandi listarfólk eru byrjaði leið sína inn í listina gjøgnum virksemi skúlans.

Seinastu 30 árini er næmingatalið vaksið støðugt, men karmarnir hava ikki fylgt við. Tann skúlin, ið varð bygdur til 12 flokkar og 240 næmingar í byrjanini av 60-árunum er enn í dag karmur um eitt virksemi, ið nú umfatar 600 næmingar í 27 flokkum, umframt 100 starvsfólk. Bygningarnir eru í dag niðurslitnir og ótíðarhóskandi til ta undirvísing, ið ein miðnámsskúli í 2007 eigur at bjóða.

Hølisviðurskiftini hjá Føroya Studentaskúla og HF-skeiði hava mangan verið á breddanum. Í 1997, tá skúlin fylti 60 ár, lá ein umfatandi umbygging í kortunum. Hon gjørdist av ongum og í staðin var ein komandi miðnámsskúladepil kunngjørdur á sjálvum 60 ára haldinum á skúlanum. Hann gjørdist heldur ikki veruleiki fyri studentaskúlans viðkomandi.

Leiðsla skúlans vónar, at farið verður undir at viðgera karmar skúlans í næstum, so 75 ára haldið í 2012 kann haldast í karmum, sum hóska til nútíðina og framtíðina.



*Í sambandi við 70 ára dagin leygardagin verður opið hús fyri almenninginum á skúlanum*

Skúlin heldur 70 ára dag sín fyri næmingunum við einum morgunmatarborði fríggjadagin 31. august. Leygarkvøldið 1. september verður hald fyri innbodnum á sjálvum skúlanum.

Øll almennu tiltøkini í sambandi við 70 ára hald skúlans eru ókeypis.

Umframt virksemið í Hoydølum, er eisini virksemið hjá Miðnámsskúlanum í Suðuroy formliga partur av Føroya Studentaskúla og HF-skeiði.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin, mikudagin**
Vestan, 3 til 8 m/s, skýggjað og regn. Út á kvøldið snarar hann í ein norðan, og hann klárar í, tó við ælaveðri. Hitin millum 7 og 11 stig.




**Veðrið hósdagin**
Av ymsum ættum, undir 8 m/s, turrveður við sólarglottum. Hitin millum 8 og 12 stig.




**Veðrið fríggjadagin**
Vestan og útsynningur, 5 til 10 m/s, skýggjað við regni. Hitin millum 8 og 12 stig.

**Veðrið leygardagin**
Vestanvindur, 5 til 10 m/s, skýggjað og regn. So líðandi snarar hann í ein norðan, og tað klárnar í, tó við ælaveðri. Hitin millum 7 og 11 stig.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 8 |
| Nuuk | 7 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 12 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 15 |
| London | 22 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 13 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 23 |
| Keypmannah. | 19 |
| Helsinki | 16 |
| Moskva | 20 |
| Berlin | 23 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 24 |
| Bukarest | 17 |
| Paris | 21 |
| Madrid | 23 |
| Róm | 33 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 35 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 33 |
| Beijing | 20 |
| New Dehli | 35 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 21 |
| New York | 30 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 27 |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 12 |

## LUFTTRÝSTIÐ





**Veðurvánirnar**
Eitt hátrýst vestanfyri Bretsku oyggjarnar flytur seg ikki, men ferðast síðani spakuliga suðureftir. Hósnáttina fer eitt minni lágtrýst framvið Føroyum av vestri, og fríggjadagin fer ein hitabrúgv framvið oyggjunum av útsynningi, og leygardagin kemur eitt tilhoyrandi lágtrýst higar av vestri.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 25/8 kl. 06⁰⁰ – 26/8. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,9°
Minsti hiti máldur í august: 0,4° - Mesti hiti máldur í august: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 25/8 kl. 06⁰⁰– 26/8 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í august: 133,0 mm

**Tiltøk í Miðlahúsinum í september**

*15. september kl. 16.00*
Tutl aðalfund

*21. september*
Alzheimersfelagið

Lesið Sosialin -tað loysir seg

## VESTFALLSKYRRINDI

4. august — Mánin næstur jørðini
5. august — Seinna kvarter
13. august — Tendring
19. august — Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 28. aug | 07.14 | 19.35 | 06.14 | 18.35 | 06.29 | 18.50 | 09.14 | 21.35 | 10.14 | 22.35 | 05.29 | 17.50 | 04.29 | 16.50 | 07.29 | 19.50 | 08.29 | 20.50 | 06.59 | 19.20 | 08.14 | 20.35 |
| 29. aug | 07.57 | 20.19 | 06.57 | 19.19 | 07.12 | 19.34 | 09.57 | 22.19 | 10.57 | 23.19 | 06.12 | 18.34 | 05.12 | 17.34 | 08.12 | 20.34 | 09.12 | 21.34 | 07.42 | 20.04 | 08.57 | 21.19 |
| 30. aug | 08.41 | 21.02 | 07.41 | 20.02 | 07.56 | 20.17 | 10.41 | 23.02 | 11.41 | - | 06.56 | 19.17 | 05.56 | 18.17 | 08.56 | 21.17 | 09.56 | 22.17 | 08.26 | 20.47 | 09.41 | 22.02 |
| 31. aug | 09.24 | 21.48 | 08.24 | 20.48 | 08.39 | 21.03 | 11.24 | 23.48 | 00.02 | 12.24 | 07.39 | 20.03 | 06.39 | 19.03 | 09.39 | 22.03 | 10.39 | 23.03 | 09.09 | 21.33 | 10.24 | 22.48 |
| 1. sept. | 10.13 | 22.38 | 09.13 | 21.38 | 09.28 | 21.53 | - | 12.13 | 00.48 | 13.13 | 08.28 | 20.53 | 07.28 | 19.53 | 10.28 | 22.53 | 11.28 | 23.53 | 09.58 | 22.23 | 11.13 | 23.38 |